


# Føroyingar fegnast um Statoil-sáttmála

**Jan Müller**

29.08.2015 - 15:06

Oljan.fo

Síðani oljuprísurin fór at lækka av álvara hevur ikki verið dagur, har vit hava frætt um frálandsskip, sum eru løgd og manningarnar uppsagdar. Men tað eru eisini sólskinssøgur í hesi annars so døpru tíð. Eitt nú kundu teir tríggir føroyingarnir við norska frálandsskipinum, Olympic Energy frá Fosnavåg, fegnast, tá teir nú um dagarnar fingu at vita, at reiðarríið teir arbeiða hjá júst hevur gjørt langtíðar sáttmála við Statoil fram til mars í 2017.

Olympic Energy er bert trý á gamalt og verður rikið við LNG gassi. Teir tríggir føroyingarnir, sum eru við skipinum, eru stýrimaður, dekkari og elektrikari. Teir siga í einum telduposti teir hava sent til Oljuportalin, at hetta eru sera góð tíðindi fyri teir, nú so nógvir av teirra starvsfeløgum ganga eini óvissari framtíð á møti. Nógvir føroyingar manna í dag stóran part av norska frálandsflotanum. Bara í Fosnavåg, har fleiri av frálandsreiðaríunum halda til, eru umleið 3500 sjófólk knýtt at teimum umleið 122 frálandsskipunum í kommununi. Av teimum eru 1200 útlendingar harímillum føroyingar.

Reiðaríið Olympic er eitt av frálandsreiðaríunum, sum heldur til í Fosnavåg í Sunnmøre, har eitt føroyskt ferðalag vitjaði herfyri. Tað eigur 23 frálandsskip

(NB: Oljan.fo (jan@foib.fo) vil fegin koma í samband við føroyingar, sum sigla við frálandsskipum á øllum heimsins høvum, so vit kunnu siga frá tykkara søgu eisini. Tit eru vælkomnir at senda myndir við eisini.)